**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



TÍÐARGREININ
*Johan Mortensen*
*Johan_@olivant.fo*



# Símun, Zen og Finland

Eg var millum teirra sum í mai mánaða lýddi á framløguna hja branding guruiðnum Símuni Anholt í Miðlahúsinum. Símun hevur ferðast í 61 londum, hann sigur seg hava ráðgivið hópin av londum hvussu hesi skulu branda seg, lond, sum fáur og ongin hevði hoyrt um áðrenn Símun gav teimum eitt brand.

Men, tá Símun lendir í Vágum og kemur úr flogfarinum; tá hendir nakað hjá hesum altjóðagjørda mutilbrandaranum : Símun sigur sannførandi og við patos at hann beinavegin sær, at Føroyar eru sooooo absolut allarvakrasta landið í heiminum, number one in the universe uttan diskussión og so luftin, the aaaaaiiiiirrrr, luft i i heimsklassa og so tann besta hann nakrantíð hevur andað í seg, verulig árgangsluft, simpulthen fantastisk, Óhmeigod, og hann sær at her er ein so super ófatulig mentan og vit føroyingar eru áhhhhhhhhhhhhh so uppruna-ligir og megakulir og jaligir og wellir og so forferdeliga fitt fólk (áhoyrararnir gleðast, gott er at vera føroyingur tavadenn tí vit føroyingar ellllska at hoyra hvussu fabolous vit eru, allir bandin, sálarliga herðaklappið dask dask) wauuv effektin hjá eloquenta slow talking bretanum, whipped cream power talk um okkum føroyingar, Globaliseraða Turbofólkið í Norðurhøvum, Zen Masters of the Universe, the very ones...

But, (men) sigur Símun, vit skulu fara stillisliga um við grindadrápi, hetta hvørvir av sær sjálvum av dálking (hø hø letur i áhoyrarunum) og, sigur Símun, í Føroyum kann internationala djett settið fáa sær alvorligar spirituellar upplivingar, Zen upplivingar, ikki kinverskt Zen við pagodum og klokkum, Kina er totalt yt veit hann at siga, men tað føroyska zennið, – Faroese Zen Air No 1, tað er framtíðin og vit skulu leggja doyðin á bara at fáa millionerar og kendissar hendavegin, ongan sum ikki hevur lummarnar fullar av platin credit cards og byggið so nøkur ordlig marglætishotel so millionerarnir kunnu verða hóskandi refreshjair.

Síðani takkar Símun við tign teimum 50 føroyingum – sum uttan samsýning – hava greitt honum frá um okkara samleika (gestablíðir, chain dance, skerpikjøt) so at hann gjørdist førur fyri at leggja Uttanríkisráðnum lag á, hvørjar ætlanir skulu setast í verk fyri at draga full flogfør av millióningum hendavegin, hvørji nýggj almenn ferðavinnustjórarstørv skulu setast á stovn og so gav hann tað lyfti, at hann minst einaferð um árið kemur henda verkið og kjekka at hansara geidleines og Zen air blíva rætt implementeraðar.

Men, bestu ráðini til landsstýrið eru, at tað beinanvegin fær sær tveir finskar ráðharrar í samgonguna. Hann visti at siga av royndum at finskir ráðharrar eru »do it men« ella »do it politikarar«.

Og so takkaði Símun fyri seg, klapp klapp. Og nú vita vit, at milliónа-samsýningin umframt expenses and travel costs føroyski skattgjaldarin letur Símuni, uttan iva eru smápengar fyri hansara gløggu observatiónir um luftina og zennið, sum fara at bjarga okkum Tjóðina! Vit føroyingar eru ikki smáligir tá vit samsýna útlendingum.

Men tað syrgiligа er, at tað vit øll rinda Sìmuni og øðrum honum líkum er fyri almindiligheitir, banalitetar, onki veruliga kreativt nýbrot, sum radikalt kann menna okkara ferðamannavinnu. Nýggju klæði keisarans enn einaferð – júst sum okkara egna vision 2015, ella hvat tað var. Lítil og ongin kritiskur sansur.

So sanniliga hava vit í dag eina vælvirkandi ferðmannavinnu her á landi við dugnaligum føroyingum, sum væl duga at marknaðarføra okkum og, væl at merkja, um tey fáa tær røttu umstøðurnar at virka í.

Hví tora so fá at seta orð á, at forðingin i dag og tungi kleppurin fyri menning av ferðamannavinnuni og framburði yvirhøvur eru ferðaseðlakostnaðurin hjá almennu reiðaríunum, Atlantic Airways og Norrønu. Verða hesir ikki broyttir bløðir ferðamannavinnan út. Íslendska ferðamannavinnan fór at blóma tá Iceland Express og Iceland Air broyttu prísleguna radikalt. Tað er snøgt sagt alt ov dýrt at ferðast til Føroyar og tessvegna kemur alt ov lítið av ferðafólki higar. Við einum returferðaseðli hjá Atlantic uppá kr. 1.200,- og onki tvass við avmarkingum, og burtur i weekend og tílíkt, høvdu vit havt full hotel og fullar matstovur heila árið og ferðamannavinnan vildi blómað – tí, vit hava eitt vakurt land og fólk vilja koma hendavegin.

Føroyar tørva kommercielt hugsandi politikarar, sum lurta eftir vinnuni og ganga hennara ynskjum á møti – »do it monnum« ... Kanska var tað ikki eitt so býtt hugskot hjá Símuni kortini at manna landsstýrið við finnlendingum !

**Eftirskrift**
Nú sunnudagin vóru tvey ferðamannaskip á Havnini. Klokkan 09.30 fyrrapartin gekk hópurin av fremmindafólki á Vaglinum og í miðbýnum og hugdi eftir souvenirs i gluggunum á Gamla Bókhandli og Kunningarstovuni og snoddaðu eftir matstovum og veitingarstøðum, men allastaðni stongt, stongt, stongt, ikki ein handil ella matstova opin ! vinnulívið í Tórshavn vil heldur sova enn at taka sær av ferðafólki ein sunnumorgun.

Tíðargreinin

# Tiðnaður blokkur

KAI VÁGFJALL



Eg helt tað vera ómetaliga stuttligt her fyri at lesa og hoyra, at Edmund Joensen hevði tosað við danska forsætisáðharran, um at tiðna blokkin upp. Eg sá fyri mær ein av hesum stóru blokkumum, sum ein kundi síggja á gøtunum í heitu londunum, sum verða tiknir fram og knústir, fyri at verða brúktir at køla við.

Onkuntíð kundi ein slíkur blokkur liggja ov leingi, so eftir stuttari tíð kundi hann verða tiðnaður so nógv, at hann at enda var heilt burtur. Við hesari myndini í huganum, var tað tí søtur tónleikur í mínum oyrum, tá Edmund kom við hugskotinum, um at tiðna blokkin upp, og helt at maðurin helst hevði misskilt okkurt, og at tað var helst tí, at Lars Løkke Rasmussen var so fegin um at spara 600 milliónir.

**Hvat bjóða nýggju og yngri kreftirnar?**
Eftir síðsta løgtingsval komu fleiri nýggj, ung fólk á ting; nøkur av hesum fyri sambandsflokkin. Eg hugsaði, at nú fara vit at síggja stórar broytingar í hesum mumieseraða flokki, hóast hesin flokkur er vorðin meira nýmótans síðstu árini, tá hugsað verður um, at hann hevur verið við til at framt nakrar yvirtøkur.

Nú veit eg ikki hvørji vallyftir hesi fólk hava brúkt sum valagn, men tær vónir eg hevði til hesi fólk (menn), hava ikki hildið, men skuffa meg almikið. Eg roknaði við, at hesir komu við nýggjum og stimbrandi tonkum og hugskotum. Væntaði at hesir fóru at bróta upp um armar og koma við ítøkiligum boðum uppá framtíðina og teir trupuleikar, sum vit í løtuni dragast við.

Tíverri, her er einki, als einki at hóma. Einasta boð, summir av hesum hava, er eitt hjálparleyst vesalakent uppskot um, at vit skulu súgva meira av donskum pengum til okkum, við at tiðna blokki.

Í einari blaðgrein fyri og aðrari eftir, gráta hesir politisku píningar um, hvussu nógv vit hava mist, tá blokkurin varð skerdur 366 milliónir. Ikke eitt orð um, hví at hann var skerdur, at orsøkin var yvirtøkan av m.ø. skúlanum, nakað sum teir áttu at veri stoltir av. Álvara tos, hvussu skralltómur og politiskt geldur kann ein vera, sum bjóðar seg fram at stýra einum landi??